## VIÐMERKINGAR

Skálafjarðartunnilin

# Eystaru – ella vestaru megin?

*Regin Jacobsen*



Í samband við at ætlanin um Skálafjarðartunnilin varð løgd fram á Almennum fundi á Svangaskarði í næst síðstu viku, eru nakrir tankar komnir fram, hvar rættast er at leggja hesa farleið millum Skálafjørðin og Suðurstreym (norður - suður farleiðin). Sum kunnugt leggur verkætlanin eisini upp til at gera eina farleið tvørtur um fjørðin frá økinum norðan fyri Toftavatn til Strendur - "Við Sjógv" (eystur - vestur farleiðin). Íalt væntast báðar farleiðirnar at kunna byggjast fyri einar 700-800 mió. kr.

**Tørvurin**
Grundin til at henda verkætlan er komin so væl ávegis, er fyrst og fremst tí ein stórur tørvur er fyri einum so stuttum vegasambandi sum gjørligt millum suður Eysturoy og Suðurstreym. At verkætlanin kann gjøgnumførast á reinum handilsligum grundarlagi ber boð um, at nyttan við at nýta hesa farleið, heldur enn at nýta verandi farleið gjøgnum Sundalagið er størri enn kostnaðurin.

**Kost / nyttu kanning**
Arbeiðsbólkurin hevur í sínum framløgum víst á, at tað kunnu sparast slakar hálvt annað hundrað milliónir krónur tey fyrstu 15-20 árini við at leggja farleiðina frá eystara armi á Skálafjørðinum heldur enn frá vestara armi. Henda sparing kemur av at útrokningarnar - "moduleringarnar" - vísa, at íroknað koma allir bilar at koyra færri kilometrar, tá farleiðin verður løgd soleiðis. Harafturat vísa framrokningarnar, at umleið 4 ferðir meir ferðsla kemur frá eystara parti av Skálafjørðinum. Henda sparing heldur áfram eisini eftir tey fyrstu 15-20 árini, eftirsum tað framhaldandi verða færri km koyrdir, og harvið minni slit á bilar, minni slit á vegir og minni tíðarnýtsla.

Verður farleiðin ikki løgd har størsta nyttan fæst burturúr, verður avleiðingin sjálvandi, at verkætlanin verður minnið áhugaverd – handilsliga. Tí er avleiðingin at avkastið av íløguni gerst verri.

**Ferðslutrygd og vegaføring gjøgnum bygt øki**
Onkur heldur, at ein grund fyri heldur at leggja tunnilin millum Strendur og Suðurstreym er, at nýggi vegurin omanfyri Skála nú verður gjørdur, og hesin gongur gjøgnum minni bygt økið. Harafturat verður ført fram, at ein møguligur tunnil millum Gøtudal og Skálabotn ger farleiðina út á Strendur styttri fyri ferðsluna úr Norðoyggjunum og økinum eystanfyri annars. Til hetta er at siga, at:

- Tað er ikki nýggi vegurin á vestara armi, sum skapar ferðslutørvin. Ferðslutørvurin kemur av tí tungu ferðsluni og teim mongu, sum hava tørv á at ferðast.

- Teinurin úr Skálabotni út í Runavíkar er tann sami, sum úr Skálabotni út á Strendur,

- Ein vegur skal gerast oman fyri Runavíkini frá Lambareiði til eina rundkoyring sunnan fyri Runavík "á Mýrunum". Hetta er ein vegur, sum varð ætlaður longu mitt í sjeytiárunum, og sum framvegis er aktuellur, óansæð um tunnilin kemur ella ikki, vegurin verður umleið 3 km til longdar. Allar útbyggingar í Runavík hava í 30 ár tikið hædd fyri hesi vegaføring.

- Største parturin av tí tungu ferðsluni til og úr Eysturoy, kemur av eystara armi á Skálafjørðinum. Tað er av sera stórum týdningi fyri vinnulívið her á staðnum, at tunnilin verður gjørdur beinleiðis millum eystara arm og Suðurstreym. Skuldi tunnilin gingið frá vestara armi, hevði hetta viðført, at øll tann tunga ferðslan skuldi niður á 100 m dýpi og so upp aftur á Strondum áðrenn leiðin gekk suðuryvir. Hetta svarar til at fara longur upp enn Gøtueiði. Harafturat leingist farleiðin íroknað uml. 4 km fyri alla ferðsluna – sambært útrokningum. Tað er heilt greitt, at vinnuligu áhugamálini tala fyri eini suður - norður farleið frá eystursíðuni á Skálafjørðinum.

- Nýggi fjøruvegurin gjøgnum alla Runavíkina er komin væl ávegis, og verður liðugur langt áðrenn koyrandi verður gjøgnum tunnilin. Hesin kemur at taka alla gjøgnumgangandi ferðslu úr Runavíkini oman á fjøruvegin. Fjøruvegurin verður gjørdur eftir nýggjastu vega forskriftum við gongubreyt báðumegin, og verður íbundin vegin úti í Rók, soleiðis at ferðslan til tunnilin kemur í landsvegin har og verður síðani førd eysturyvir til verandi rundkoyring.

- Samanumtikið kann sigast, at áðrenn tunnilin er liðugur, eru tveir vegir klárir gjøgnum Runavíkina, sum hvør er 8 m breiðir. Harafturat verður vegurin omanfyri Runavíkina gjørdur innan fyri eina rímiliga framtíð.

- Tað er eingin yvi um, at vit verða tilreiðar at taka ímóti ferðsluni sum fer at koyra eftir eystara armi í 2012.

---

# Gomorin, godag og forvæl!

**Eyðun á Borg**
*Á Borg á Argjum í jólaføstu 2005*



Verður føroyskt mál ávirkað av donskum og enskum? Ja, í hvussu so er øðrum teirra!

Forvæl, sum nógv nú siga, man tó ikki koma av danskari ávirkan, ella hvussu!?

Havi annars hoyrt onkran siga:Góða morgun! Sjáldsamt!

Gott kvøld og góða nátt duga vit tó at siga enn!

Bei, tit!
Við málkvøðu!

---

# Um neyðhjálp og menningarhjálp

SJÓNARMIÐ
*Heini Olsen*



Nú vóru bara menn í sjónvarpstjakinum hetta týskvøldið um neyðhjálp og menningarhjálp; men tað var kortini sera áhugavert at síggja teir luttakandi og hoyra, hvat teir søgdu um hesi fyri framtíð mannaættarinnar so týdningarmiklu mál.

Somuleiðis kundi eg hugsað mær tað verið hugaligt hjá teimum at vita, hvat áskoðarin og lurtarin heldur um sendingina og tað, umrøtt var.

Av ti, at menn, hóst hvør úr sínum flokki, vóru so sjáldsama samdir, varð sendingin í sjálvum sær eitt lívsjáttandi fyribrygdi, nú tað stundar móti nýggjum ári og ljósari døgum.

Sum í flestu húskjum hava vit innanhysis og saman við øðrum mangan tosað um hjálpartiltøk sum heild og um, hvat frægast man vera at gera.

Samd hava vit verið um, at reiður peningur ikki beinleiðis kann latast stjórnini í rakta landinum; men einans gjøgnum viðurkendar hjálparfelagsskapir, og/ella teimum, sum sjálvi fylgja við neyðsynjarvørum ella -peningi, og sum ansa eftir, at alt kemur á rætta plássið.

Um átrúnaðin er at siga, at hjálp til neyðstødd tíbetur er ein av grundarsteinunum undir flest øllum religiónum, og tað, vit eftir 18 árstølum kenna til muslimar, eru hesir ikki ólíkir okkum føroyingum, hvat næstrahjálpini viðvíkur; men hvørt hetta fyri báðar partar deils snýr seg um samvitskubót og deils um frægari sess í paradísi, dugi eg ikki at siga - vónandi mest av medmenniskjansligari samkenslu. Í hvussu er skúgvaðu muslimar seg kanska ikki so ofta undan biddarahondum, sum vit kristnu høvdu lyndi til, hetta tó helst av tí, at uppgávan tóktist okkum so vónleys.

**Neyðhjálp**
Hetta kann kanska ljóða eitt sindur rasistisk; men tað gerst so ikki við, tí munur er á at lata hjálp til lond, har fólkið er so fátækt, at tað noyðist stjala tað, sum hendur fæst á, og so t.d. beinleiðis at rætta myndugleikunum í Íslandi eina kontanta hjálpandi hond undir gosfjallavanlukku ella skalvalopi; men tað skerst ikki burtur, at jú fjarari landið liggur, jú meira illgrunasom gerast vit fyri mutri - hetta tíverri ofta av røttum. Okkum nýtist ikki fara longur enn niður í ES.

Heitið neyðhjálp átti kanska heldur at veri nevnd vanlukkuhjálp ella okkurt tílíkt, sum bendir á, at her má berast skjótt at, um tað skal muna.

Frá tveimum árum í tjaldi kann eg viðmerkja, at skuldi jarðskjálvtarakta fólkinum har norðuri í Pakistan verið lív lagað á vetrartíð, vildi tjaldið verið líka neyðugt sum matur og vatn. Væl ílætin í ullintum klæðum ber til í kavaroksbarda hálendinum at lívbjarga sær í tjaldi, sum gerst fjálgari, tá kavin tyrvur; men hálvnakin á berajóli er bert at bíða eftir skjótum deyða. Nú er kuldin komin og sambært útvarpinum flestu teirra ætlandi longu deyð, sum av hesi orsøk doyggja skulu - hjálpin er komin ov seint; men har er tó nógv eftir at nýta peningin til.

**Menningarhjálp**
Somuleiðis eigur menningarhjálp so avgjørt heldur at nevnast menningarsamstarv, hetta av fleiri orsøkum.

Fyri tað fyrsta vil heitið, menningarsamstarv, ikki ljóða so álmussukent sum -hjálp, og fyri tað næsta verður, sum flestøllum kunnugt, minni parturin av játtaðu menningarupphæddunum við vinningi fyri eyga, eitt nú frá ST, ES ella DANIDA beinleiðis brúktur í sjálvum móttakaralandinum. Restin fer til umsiting og rakstur av ymiskum slag, kalla tað hvat tú vilt; men soleiðis er.

Fyri tað triðja verður vónandi vinningur fyri báðar partar í einum samstarvi. Fyri tað fjórða er tann møguleiki, at annað framkomið land eisini kann sleppa upp í part, eitt nú brøðralandið fyri vestan, Ísland, hvørs største tjóðarinntøka sigst stava frá vitan á so mongum økjum.

Tað vit hava sæð, hevur norrønt samstarv í menningarlondum frá almennari síðu verið heilt út av lagi vánaligt. T. d. vóru øll tey norrønu londini í 1990-unum til staðar á Zanzibar, og kundu tey kanska veitt fleiri ferðir so stóra hjálp burtur úr peninginum, um tey samstarvaðust, so her hava vit av sonnum møguleika í breiðum samstarvi at ganga undan og gera vart við okkum, nú talan er um javnbjóðis rættindi í norðurlanda høpi.

At vit, slakar fimmtitúsund sálir, sum sjálvar enn ganga undir at liva av lutvísari álmussu, skulu ditta okkum at síggja burtur frá føroyskum vinningi í menningarsamstarvi, ljóðar ikki rætt, tí hava vit ikki alla tíðina tað fyri eyga, hvat vit sjálvi skulu liva av, so kunnu vit heldur ikki hjálpa øðrum.

Nei, eitt tætt menningarsamstarv við tí fyri øll opna stavnhaldi at menna vinning til báðar ella allar síður, tað man í longdini vera rætta leiðin at ganga.

Hóast átrúnaður í menningarsamstarvi hvørki skuldi gjørt til ella frá, so kann tað væl ikki vera til nakran bága, at tey í Peru halla til kristna partin - eg haldi ikki hasin spurningurin eigur at vera nevndur í tjakinum um menningarhjálp ella -samstarv. Ein verkætlan sum henda er nóg torfør, sum er og krevur heilt serstakt snildi, um nakað skal spyrjast burtur úr.

Sera óheppi dømi er um politiskan kleyvarskap á hesum vinnuliga øki; men lat ta søguna fara til eina aðru ferð.

Men sum eg byrjaði við, so hevði ein praktisk kvinnurødd í fleiri førum undir góða tjakinum hetta týskvøldið ivaleyst gjørt jarðbundnan mun, tá menn, sum okkum vant, høvdu lyndi at gerast alt ov sjálvgglaðir og heldur enn ikki háfloygdir.

Við ynski um frið í komandi ári, hetta her á landi, í Peru og í øllum heiminum fara eg við hesum at ynskja øllum ein gleðilig jól og eitt hjálparviljað og mennandi nýggjár.